# Posta Stamps

Føroyar Nr. **55** August 2023



Posta FAROE ISLANDS

**Fyrstu føroysku kryptofrímerkini**

**1000 føroysk frímerki**

**Frímerki nr. 1000 hjá Martini Mörck**

Posta skrivar søgu:

# Føroysk kryptofrímerki

Posta hevur givið frímerki út í nærum hálva øld. Nú flyta vit okkum inn í talgilda frímerkjaheimin, har vit, sum tað fyrsta norðurlendska postverkið, geva út kryptofrímerki.

Hesi nýggju kryptofrímerki – eisini kallað NFT-frímerki – verða givin út undir heitinum Stamps of Maybe. Tískil hava tey ikki nøkur FO-nummur sum vanligu frímerkini hjá Posta, men hava harafturímóti síni egnu NFT-nummur.

Kryptofrímerkini eru nevniliga heilt øðrvísi enn vanlig frímerki – og tó. Tey kunnu brúkast sum postgjald, men hvørt frímerki hevur eisini ein talgildan tvíbura, sum búleikast á alnótini. Hvussu hesin tvíburin kemur at síggja út, er treytað av hendingum uttanífrá og av tær sum eigara av slíkum frímerki.

Talgilda kryptofrímerkið er knýtt at Veðurstovu Føroya, og tí hevur veðrið í Føroyum, júst ta løtuna, tá tú virkir tvíburan, ávirkan á, hvussu tvíburin kemur at síggja út. Hvørt kryptofrímerki hevur eina QR-kotu, sum skal brúkast, tá tú virkir tann talgilda tvíburan. Nær tú virkir tvíburan er fullkomiliga upp til tín. Tú kanst gera tað beinanvegin ella bíða til ta, fyri teg, røttu løtuna. Tí kanst tú siga, at talan er um eitt slag av talgildum tíðarhylki.

Fjøllistamaðurin, Heiðrik á Heygum, hevur fingið heiðurin at sniðgeva fyrstu útgávuna hjá Stamps of Maybe. Sera hóskandi er myndevnið tær fýra árstíðirnar.

## Vár, summar, heyst og vetur

Heiðrik á Heygum gevur her sítt boð upp á, hvussu hann ímyndar sær tær fýra árstíðirnar í Føroyum. Hetta ger hann við fýra vøkrum myndakollasjum ella tyssum, kunnu vit rópa tær, sum hvørt myndar eina árstíð. Í hvørjum tyssi eru bæði blómur og annar vøkstur umframt fuglur ella fenaður. Føroyingar hava altíð verið knýttir at náttúruni og tí tilfeinginum í náttúruni, og tað vísa hesar myndirnar á.

## Várið

Ikki er tað løgið, at Heiðrik júst hevur valt smálambið, tjaldrið og sóljuna til at mynda vártyssið. Hvat er meira várligt enn at hoyra eyðkendu klippini frá tjóðfugli okkara og at síggja spælandi smálomb á bønum? Foldin vaknar, gróðurin kemur, og bæði blómur, kríatúr og vit menniskju gleðast um ljósið, sum vinnur á myrkrinum. Nú kemur lív í – bæði í bø og haga. Veitir og vátlendi gulna so hvørt sum tjóðarblóman, mýrisóljan, sprettur. Gakk tær ein túr ein vakran várdag, og tú hoyrir á fuglasonginum, hvussu eisini teir gleðast og fegnast um hesa árstíðina.

## Summarið

Summarið er tíðin, tá gras og allar urtir standa í fagrasta blóma, og ongantíð eru Føroyar so grønar sum um summarið. Reyðsmæran,

hagasóljan og aðrar blómur prýða summartyssið saman við tveimum av okkara kendastu fuglum – lundanum og súluni. Sveivin á einum grindahvali sæst eisini stinga úr tyssinum. Ja, hetta er árstíðin, tá Føroyar kunnu vísa seg frá síni vakrastu síðu. Dagar við dýrd á vík og vág og havið sum ein sveiti.

”Tað er so vakurt, so vakurt í Føroyum at búgva” yrkir Fríðrik Petersen.  Ja, Føroyar eru bergtakandi um summarið.

## Heystið

Nú følnar gras á bø og ong. Flytifuglarnir eru farnir, og friðarligt er í haganum.  Nú er tíðin, at eplini skulu takast upp og røtur og onnur grøði fáast til høldar. Fjøllini verða gingin, og flettingin er fyri. Veðrurin og havhesturin prýða heystartyssið saman við soppum og følnaðum leyvi. Dagarnir styttast, og kvøldini leingjast. Men heystið er eisini ein spennandi tíð. Skúlar og annað virksemi byrja aftur eftir summarsteðgin, og eisini er hetta tíðin, tá nógv ung lesandi leita sær av landinum at nema sær útbúgving. Men eins og við flytifuglunum, so vóna vit, at flestu teirra koma heimaftur eftir loknan lestur.

## Veturin

Føroyski veturin kann vera harður og baldrutur; tað er ongin loyna. Lágtrýstini hava hug til at savnast kring oyggjarnar, og veðrið er hareftir. Ruskveður, stormar og sjálvt ódnir eru, um ikki gerandiskostur, so ikki óvanligar hesa árstíðina. Men at síggja norðlýsið blaktra um fjallatind ein stillan, kláran kavadag er ein undurføgur sjón. Hesi bæði, norðlýsið og kavaflykrur, prýða saman við haruni og gásini vetrartyssið. Gásarhald hevur verið í Føroyum alt tað, vit vita um, so gásin er helst komin til Føroya longu í landnámstíð. Haran harafturímóti er innflutt í nýggjari tíð. Fyrstu harurnar blivu settar upp í Føroyum í 1855, og tær komu úr Kragerø í Noregi. Loyvt er einans at skjóta haru frá 2. november til 31. desember.

Soleiðis heldur ringrásin fram. Árstíðirnar koma og fara, hvør við sínum serliga huglagi. Náttúran sprettur, blómar, følnar og fer í dvala – inntil næstu ferð hon vaknar, og ringrásin endurtekur seg.

Les meira á www.Stampsofmaybe.fo.

*Maud C. á Geilini*




**Árstíðirnar** / Listafólk: Heiðrik á Heygum

# Posta hátíðarheldur
# Frímerki nr. 1000




Frímerkið er ein spegilsmynd av tjóðini.  Eitt kaghol innar í landsins sál, útsjóndina, søguna, plantu- og djóralív og ikki minst fólkalív.

Tann 10. august kunnu vit hátíðarhalda, at føroyska frímerki nr. 1000 kemur út. Hesum gera vit nógv burturúr, og verður útgávutiltak á stórari framsýning í Cleveland, USA, nevnd GASS 2023.

Edward Fuglø hevur sniðgivið vakra smáarkið, sum myndar ein varða. Edward Fuglø hevur sniðgivið nógv føroysk frímerki, og vit litu tí honum upp í hendur at sniðgeva okkara frímerki nr. 1000.

Edward hevur teknað ein varða úti í haganum eitt summarkvøld. Huglagið er summarkent, og varðin er umgirdur av tí plantu-, fugla- og djóralívi, sum er at síggja í haganum hesa ársins tíð. Huldan og nykurin eru somuleiðis partur av myndini.

Ein varði kann hava ymiskan súmbolskan týdning – hann kann vera bæði vegvísari og fastapunkt, sum nevnt verður niðanfyri.




**Frímerki nr. 1000: Varði**
Listafólk: Edward Fuglø
Myndrist: Martin Mörck

Frímerki nr. 1000 er ein varði á longu frímerkjaleiðini hjá Posta síðan 1975, tá fyrstu føroysku frímerkini vórðu givin út.

Frímerkini eru ein lítil mentunarberi, ið røkkur langt handan landamørk, langt út í heimsins fjarastu krókar og skot. Á hesum lítla pappírslepa kunnu vit siga frá mongum forvitnisligum, og tað hevur altíð verið endamálið við teimum føroysku frímerkjunum.

Viðurkendi norski listamaðurin Martin Mörck hevur myndrist frímerkið, sum er prentað í stálprenti og offsett.

## Varði

Ein varði er eitt vegamerki ella eitt sólarmerki, ið er lagað upp av gróti sum ein keyla. Varðar hava frá gamlari tíð verið at finna í øllum Norðurlondum. Í Danmark hevur býurin Varde navn eftir sama fyribrigdi.

Varðar hanga í Føroyum frá gamlari tíð uppi við teimum gomlu bygdagøtunum ella varðagøtunum og vísa á leiðirnar millum bygdir. Hetta eru gonguvarðarnir.

Tað eru í Føroyum eisini varðar, ið eyðmerkja ættirnar í eini bygd, eitt nú Vesturvarði, Norðurvarði og Suðurvarði ella eru lagaðir sólarmerki,  sum eitt nú Middagsvarði ella Nónvarði. Her er ikki talan um gonguvarðar í vanligari merking, men sum  fastapunkt eins og har teir verða brúktir sum siglingarmerki. Kongavarðarnir á Argjahamri, sum hava givið byggingini undir Kongavarða á Argjum navn, eru lagaðir í 1907, tá Fríðrikur 8 kongur var og vitjaði í Føroyum.

Frá gamlari tíð hava Føroyar verið eitt bygdasamfelag við bø og haga. Sjálv bygdin við bønum er innan fyri bøgarðarnar, meðan hagin varð uttanfyri, og hagar fóru fólk ikki dagliga uttan í serligum ørindum. Í fornari tíð var tað illa sæð –  ja, beinleiðis bannað, at ganga í haganum, uttan at tað var við serligum endamáli, tí tað órógvaði seyðin. Røktingarmenn, sum varaðu av seyðunum, gingu sjálvandi burtur í haga. Eisini gingu fleygingarmenn, sum fóru at fleyga fugl, gjøgnum hagan. Onnur kundu fara í hagan í krónna eftir torvi, og um summarið gingu neytakonurnar í haganum fyri at mjólka neytunum. Ongin gekk uttan orsøk og mól í haganum. Hildið var, at tað vóru bert seyðatjóvar, sum gjørdu tað. Seyðatjóvar fingu harða revsing, um teir vóru tiknir, og tí vóru teir vandamiklir at koma í hóslag við hjá einsamøllum fólki. Tá fólk fyrr gingu í haganum, gingu tey sínar lógligu leiðir, og tær vóru eftir vørðunum ella varðagøtunum millum bygdir. Har kendu tey seg rímiliga trygg.

Uttan fyri varðagøturnar var vandi á ferð, ikki bert fyri at koma fram á seyðatjóvar, men har húsaðust eisini  øll tey fornesku, serliga huldufólkini. Har kundi huldan, sum ynskti sær mann, sita uttan fyri heyggin og spinna. Kom maður í hóslag við hana, kundi honum verða boðin óminnisdrykkur, og gloymdi hann at blása froðuna omanav, so kom hann í hennara vald. Nykurin helt til við vøtn og stórar áir, og hann kundi skapa

seg um til ein fittan hund ella ein vakran hest, sum lokkaði bæði børn og vaksin til sín. Nurtu tey við hann, so vóru tey straks føst í honum, og fór hann tá beina leið niður í vatnið við teimum.

Einsamøll ferðaðust fólk bert í dagslýsi millum bygdir, men tað kundi henda, at tíðin fór frá teimum, so tey komu at ganga seg inn í skýming og myrkur, og alt kom tá at verða meira huldisligt og óunniligt, sjálvt mánalýsið fekk mangt undarligt at koma fram í haganum.

Um dagin kundi mjørki leggjast yvir landið, so tað næstan ikki sást fram um nøsina, og tá kundi tað vera torført at finna leiðina til næsta varða, um gøtan ikki var væl trádd. Søgur eru um neytakonur, sum tá hava gingið seg í óføri í mjørka. Ringast var um veturin í kulda og kavaroki. Tá var ikki annað at gera enn at halda seg til tann varða, ið ein var komin til, og bíða. Seta teg niður mátti tú ikki, tí tá kundi tú sovna, og kuldadeyðin var vísur. Søgur eru um menn, ið hava tikið varða niður fleiri ferðir og lagað hann uppaftur fyri at halda seg heitan, og tað bjargaði lívi teirra. Varðarnir hava sostatt ikki bert víst vegin, men eisini á sín hátt varðað av fólki. Tað er ikki fyrr enn í nýggjari tíð við eini heilt øðrvísi náttúrufatan, at fólk hava fingið trongd til at ganga um allan hagan til stuttleika, og tað hevur sínar trupulleikar.

Varðar daga upp í landslagnum og síggjast. Teir eru bæði vegvísarar og fastapunkt. Tí eru varðar vorðnir ímyndir av fastapunktum, ikki bert í søguligu gongdini í landinum, men eisini í lívsleiðini hjá einstaklingum, og fólk, sum á ymiskan hátt skara framúr, kunnu tí eisini verða umrødd sum varðar. Tað er ikki av ongum, at fyrsta føroyska bókmentafelagið, sum síðani 1921 hevur givið út eitt tíðarrit, gav tí navnið Varðin. Tað er heldur ikki av tilvild, at eitt vinnu- og reiðaravirki, sum var stovnað í Gøtu í 1985, fekk sær navnið Varðin. Her var tað sjálv ímyndin, sum taldi.

*Jóan Pauli Joensen,*
*fólkalívsfrøðingur*



Varði, Norðradalur.
Mynd: iStock

## Martin Mörck fer um søguligt mót

# Frímerki nr. 1000




Tann 11. august 2023 hátíðarheldur Martin Mörck, heimsins virknasti núlivandi frímerkjasniðgevi og -gravørur, útgávuna av frímerki sínum nr. 1.000 í Cleveland, Ohio.

Hendan dagin hava 1.000 ymisk snið og/ella graveringar hjá Martini Mörck prýtt 1.152 frímerki útgivin av 28 postverkum um allan heim. Føroyar hava tá givið út 48 av verkum hansara, harav 40 sum vanlig frímerki og átta sum postgjaldsmerki.




**Frímerki nr. 1000 hjá Martin Mörck**

Málningur: Emil Krause

Myndrist: Martin Mörck

Sigast skal, at munur er á, hvussu Mörck ger upp, og hvussu Posta ger upp. Í mun til Mörck roknar Posta ikki postgjaldsmerkini upp í samlaða talið. Posta eyðmerkir postgjaldsmerkini í ein annan bólk enn tey vanligu frímerkini, hóast bæði verða brúkt til frímerking. Sum listamaður roknar Martin Mörck upp í sína uppgerð hvønn einasta pappírslepa, sum verður brúktur til frímerking, og sum er prýddur av einum av verkum hansara.

Sum eldhugaður savnari av verkunum hjá Martini Mörck havi eg havt stóran áhuga í at givið mítt íkast til uppkast og menning av frímerki hansara nummar 1.000. Eg veit, at Mörck eins og eg hevur stóran tokka til Føroyar (smb. grein míni í Posta Stamps nr. 51), og tí hevur tað verið ein dreymur hjá mær, at frímerki hansara nummar 1.000 var givið út sum føroyskt frímerki.

Í juli 2021 legði eg fram fyri táverandi leiðaranum á Posta, Svanbjørg Manai, mítt fyrsta uppskot um frímerki nummar 1.000 hjá Martini Mörck. Uppskotið var væl móttikið. Vit umrøddu evnið fleiri ferðir, men verkætlanin var ikki endaliga samtykt fyrr enn í februar 2022 á altjóða frímerkjaframsýningini í London, tá eg aftur hitti Svanbjørg og eisini Ingun Olsen, nýggja leiðaranum á Posta Stamps, og listamanninum sjálvum. Eftir innleiðandi orðaskifti í London komu vit ásamt um, at myndevnið fyri frímerkinum skuldi snúgva seg um havið, tí Martin sjálvur er ítrivssiglari, og fyri at avspegla mentanarsamleika Føroya og draga inn tað føroyska landslagið. Vit hildu hugskotið um at nýta ein føroyskan málning vera gott, um vit funnu ein málning, sum leyk allar treytir. Umframt mín áhuga fyri hesari serligu fagnaðarútgávu hevði eg eisini leingi ynskt, at frímerki nummar 1.000 hjá Martini Mörck skuldi vera tað fyrsta frímerkið nakrantíð, sum var graverað í hond. Eg kom tí fram við hesum ynskinum, og at enda blivu vit eisini samd um tað.




**Martin Mörck graverar frímerki sítt nr. 1.000 í hond á eina stálplátu.**
Mynd: Armağan Özdinç

Næsta stig var at kanna føroysk listasøvn, og hetta fór Svanbjørg undir. Hon fann onkrar málningar, men vit høvdu trupult við at taka avgerð. Eina dagin segði Svanbjørg mær, at hon hevði funnið ein málning, sum henni dámdi væl. Henda málning hevði hon sæð á eini vitjan hjá kenda føroyska listamanninum Edwardi Fuglø. Talan var um málningin hjá Emil Krause frá 1933 við heitinum "Aftur av útróðri", sum hekk á vegginum í borðstovuni hjá Edwardi. Myndevnið á málninginum leyk allar avtalaðu treytirnar. Vit vístu Martini eina mynd av málninginum, og honum dámdi hann eisini væl. Hann gjørdi av at gravera málningin sum sítt frímerki nummar 1.000.

Tá ið myndevnið nú var valt, fóru eg og Durita Jacobsen frá Posta undir at sniðgeva frímerkið nummar 1.000 hjá Mörck og tilhoyrandi miniarkið. Víðagitni pólski gravørurin Czesław Słania er upphavsmaður til higartil størsta hondgraveraða frímerkið. Hetta var frímerki nummar 1.000 hjá Slania, sum var givið út av svenska postverkinum í ár 2000. Til hetta frímerkið graveraði hann eitt lítið brot av eini loftsfresko frá barokkinum í kongaliga summarbústaðnum Drottningholm Slot nærhendis Stokkhólmi. Skapið á frímerkinum innan fyri gatingina er 55 x 75 mm. Vit vildu seta met, og vit settu tí støddina á krotingini á frímerkinum hjá Mörck at vera 62 x 82 mm.

Í august 2022 vitjaði eg Fuglø í heimi hansara í Klaksvík og hugdi at upprunamálninginum hjá Krause, sum Martin skuldi gravera eftir. Tað var ein heilt øðrvísi uppliving fyri meg at síggja upprunamálningin. Mín fyrsta reaktión var "wauw"! Talan er um ein vakran oljumálning á lørifti, 98 x 128 cm til støddar. Málningurin ímyndar tríggjar troyttar føroyskar útróðrarmenn, sum roykja pípu við ruskutu sjóvarstrondina á Viðareiði. Teir eru á veg heim av útróðri og hava sjófongin í leypum á bakinum. Staðsetingin á myndevninum er høgrumegin landsveg 70 nærhendis bátarampan, tá mann kemur úr Viðareiðistunlinum. Edward segði mær, at hann hevði keypt málningin, tí abbi hansara var útróðrarmaður av Viðareiði. Hann sær abba sín fyri sær, tá hann hyggur at málninginum.

Danski málarin Emil A. Krause (1871-1945) vitjaði Føroyar tvær ferðir í byrjanini av 1900. Meðan hann var í Føroyum, málaði hann nakrar málningar, sum lýsa føroyskan livihátt og landslag. Hann dugdi ómetaliga væl í sínum vøkru málningum at lýsa fólk og umhvørvið, tey livdu í. Hansara málningar hava

hjálpt okkum at skilja tað føroyska samfelagið, sum tað var tá.

Umframt at gravera frímerkið, so er Martin upphavsmaður til myndprýðingina og serstemplið á fyrstadagsbjálvanum. Myndevnið á bjálvanum vísir andlitið á listamanninum sæð á vangan, meðan hann graverar eitt frímerki. Staðurin á fyrstadagsstemplinum er Klaksvík, har upprunamálningurin er.

Í august í ár verður søga skrivað í Cleveland í fleiri brøgdum. Martin Mörck gevur út sítt frímerki nummar 1.000 sum annar frímerkjalistamaður nakrantíð, har Slania var hin fyrsti. Samstundis fer hann at vera tann gravørurin, sum hevur graverað størsta frímerkið nakrantíð, og føroyska postverkið gevur út hetta størsta hondgraveraða frímerkið. Lat ikki hesa søguligu hending gleppa tær av hondum. Vit síggjast í Cleveland!

Armaĝan Özdinç



**Martin Mörck í ferð við pennatekning í graveringssniði av málninginum hjá Krause, so myndevnið kann verða flutt á stálplátu.**
Mynd: Armaĝan Özdinç

# Felagsútgáva við Grønlandi

# Huginn rannsóknarferðin




Í august 2023 byrjar astronauturin Andreas Mogensen sína rannsóknarferð til altjóða rúmdarstøðina ISS. Heitið á rannsóknarferðini er *Huginn*, uppkallað eftir øðrum av Óðins ravnum. Í hesum sambandi geva Posta og Tusass í Grønlandi út eina felags frímerkjaútgávu í samstarvi við ESA – European Space Agency.

Hetta er onnur ferðin hjá Andreasi Mortensen til altjóða rúmdarstøðina, men hesa ferð skal hann vera eitt hálvt ár umborð. Har skal hann gera eina ørgrynnu av vísindaligum granskingarroyndum, m.a. 10 royndir frá Danmark, ið umfata telduskaptan tykisveruleika (Virtual Reality), rúmdarsvøvn og veðurlagsvísindi. Andreas hevur gjørt vart við, at hann á rúmdarstøðini ikki bara umboðar Danmark, men allan ríkisfelagsskapin, t.v.s. Danmark, Føroyar og Grønland.

Á heysti 2022 setti Århus Universitet seg í samband við Posta, um vit kundu veita ravnamyndir í sambandi við ferðina. Vit bjóðaðu teimum at gera eitt frímerki út frá heitinum á rannsóknarferðini – Huginn, mýtiska ravnin hjá Óðini – og hvussu hann virkar sum ein ímynd fyri vísindi og innsavnan av vísindaligari kunning.

Enn hava vit ongar astronautar í Føroyum og Grønlandi. Ravnum, harafturímóti, hava vit ivaleyst av, bæði veruligar og mýtiskar, umframt søgur um vísa fuglin. Felagsútgávan við norrøna Huginni og samsvarandi eysturgrønlendska andaravninum "Qaartuluk" er ein heilsan til okkara astronaut umvegis ríkisfelagsskapin. Vit eru errin av Andreasi Mortensen – ynskja honum eina góða rúmdarferð og alt tað besta við arbeiðinum harúti.

## Ravnurin

*Huginn og Muninn flúgva hvønn dag*
*Jarðargrund yvir.*
*Eg ræðist at Huginn ei kemur aftur,*
*tó óttist eg meira um Muninn.*

Soleiðis tekur Óðin til um ravnar sínar í fornnorrøna kvæðinum Grimnismál. Í norrønari gudalæru er Óðin fremstur av ásum – guddómur fyri himnahválvinum, vísindi og skaldakynstri – drottur í guddómligum hálindum, ið umfata guda-heimin Ásgarð, umframt mannaheimin Miðgarð.

## Kaos og Kosmos

Norrøna gudalæran lýsir serstakliga áhaldandi skiftið millum Kaos og Kosmos. Kosmos, tann skipaði heimurin, har gudar og menniskju ráða og liva, stendur sum andstøða mótvegis Kaos, tí óskipaða heiminum, sum í roynd og veru er av somu staklutum, bara í óskipaðum høpi. Kaos er umboðað við marknaðarlondunum í Útgarði, hvørs íbúgvar oftast eru antropomorfar lýsingar av ótamdum náttúrumáttum (villini hav, vindur, eldur, gosfjøll o.s.fr.) umframt teir lutir og tey fyribrigdi, sum hvørki gudar ella menniskju hava tamarhald á – ella nóg góða vitan um.

## Óðin – vísindin

**Hugin – vísindaliga granskingin**

Vísastur av gudum øllum er Óðin. Hann fylgir við støðuni í alheiminum – eygleiðir og granskar hitt ókenda. Til at leita sær kunnleika nýtir hann, millum annað, ravnarnar báðar, Huginn og Muninn. ”Huginn” merkir ”hugur/hann ið hugsar”, altso menniskjaligu evnini at hugsa og eygleiða – meðan ”Muninn” merkir ”minnið/ hann ið min-nist” – evnini at minnast og læra av royndum. Saman virka ravnarnir báðir sum hjálparandar, ímyndir fyri hugflog og evnini at fyristilla sær.



Vetrarbreytin avmyndað frá rúmdarstøðini ISS.
Mynd: ESA

Hvønn dag flúgva Huginn og Muninn út í heim – og tá teir um kvøldið koma aftur til Valhallar, seta teir seg við hásætið og siga Óðini, hvat teir hava sæð, hoyrt og lært á ferðini. Út frá tí, ið ravnarnir siga honum, økir Óðin um sín kunnleika og kemur fram til sínar niðurstøður viðvíkjandi norrøna alheiminum.

Navnið "Huginn" er eitt sera vælvalt heiti til eina vísindaliga rúmdargranskingarferð. Í hesum samanhanginum ímyndar Óðin vísindaástøðið – og Hugin vísindaligu rannsóknina. Rannsóknin granskar og sendur úrslitini til vísindina, sum viðger tey út frá verandi vitan og royndum.

Astronauturin er Óðins ravnur – og Óðin sjálvur, arbeiðsgevari hansara, vísindin.

## Myndevnini

Strikutekningin í vinstru síðu á frímerkjaarkinum avmyndar søguna, har grønlendski angakokkurin samskiftir við ravnaandan Qaartuluk – meðan myndin høgrumegin er av Óðini, ið tekur ímóti sínum ravnaanda, Huginn í Ásgarði. Legg til merkis, at báðir ravnarnir hava eitt ornamentalt eyga á kroppinum, sum ímyndar, at teir eru "eyga hjá shamaninum" – og ikki vanligir ravnar. Stóri ravnurin á sjálvum frímerkinum hevur neutralan ornamentikk, so hann kann umboða bæði norrøna og inuitiska mentanarfelagsskapin.

*Anker Eli Petersen*




**Huginn rannsóknarferðin**
Listafólk: Anker Eli Petersen




**Andreas Mogensen**
Mynd: ESA

# Sound Art Live Theatre
# SALT




Suðuroy er syðsta oyggj í Føroyum og er serstøk bæði mentanarliga og jarðfrøðiliga.

Suðuroyggin hevur eisini eitt mentanarhús, sum ikki líkist øðrum mentanarhúsum. Talan er um gomlu saltsiluna, sum er vorðin umbygd til tónleika-, sjónleikar- og fjølmentanarhúsið SALT, sum í dag stendur fyri *Sound Art Live Theatre*. Húsið var upprunaliga bygt í 1937-38 og er nú endurreist til ein nútímans mentanarbygning, sum skapar karmar um eitt ríkt og virkið mentanarlív í Suðuroy. Hóast talan er um ein nútímans bygning við nútímans hentleikum og slóðbrótandi hitaskipan, sum er 100 % grøn, eru á leið 75 % av gamla bygninginum varðveitt í dag.

Bygningurin líkist burtur úr øðrum bygningum í føroyska landslagnum. Vit vita tíverri ikki, hvør upprunaligi arkitekturin var, men vit vita, at talan var um ein fransmann, og at tað var franska felagið *Compagnie Commerciale des Sels Marins*, sum læt bygningin byggja. Felagið er til enn, og var tað hetta felagið, sum sat á meginpartinum av saltinum í Europa, tá ið saltsilan var bygd.

Vit hava, líka síðan verkætlanin at endurreisa mentanarhúsið SALT fór av bakkastokki, roynt at funnið fram til franska upprunaarkitektin, men tíverri til fánýtis. Kanska onkur árvakin




**SALT**

Myndir: Fotostudio

Frímerkini mynda ávikavist snøgga bygningsverkið undir loftinum umframt snyrilstrappuna og vakra bygningin uttan við búmerkinum á skjøldrinum – spælimaðurin hjá Williami Heinesen.



frímerkjasavnari úti í heimi hevur eitt hugskot um, hvør arkitekturin er. Viðkomandi hevur í hvussu so er teknað ein bygning, sum bæði innan og uttan er serstakur og hugkveikjandi. Innan eru tað serliga teir upprunaliga, løttu og elegantu stál- og betongbogarnir, sum seta sín dragandi dám á bygningsverkið, og fortelja eina einastandandi søgu, sum knýtir fortíð og nútíð saman.

Orsøkin til at ein so stórur ídnaðarbygningur var bygdur í Føroyum í tríatiárunum, var, at føroyski fiskiflotin var vaksin so nógv, at økti eftirspurningurin eftir salti kravdi eina størri og nútímans saltgoymslu. Ætlanin hjá fransmonnum var at byggja fleri saltsilur í Norðurhøvum, eitt nú í Íslandi og Noregi, men av tí at annar heimsbardagi brast á, vóru allar slíkar ætlanir sleptar. Tí er saltsilan á Drelnesi tann einasta av sínum slag við tí reina parablinum, sum er til í dag. Ikki tí, vit vita um aðrar silur, sum í skapi kunnu minna um hesa, m.a. í Italia, Liverpool og Casablanca. Vit hava eisini skilt, at ætlanir eru um at endurbyggja onkrar av hesum bygningum til mentanarhús ella líknandi endamál. Vit vilja fegin frætta nærri, um onkur frímerkjasavnari veit meira um hetta.

Tá ið farið var undir at endurbyggja saltsiluna, var hon meira ein ruin enn nakað annað. Men hon var ein vøkur ruin, meiri at kalla ein poetisk ruin, ið bar boð um eitt hús bygt av livandi hondum. Í dag er saltsilan eitt livandi hús við nógvum og fjølbroyttum mentanarligum virksemi. Ein av stóru avbjóðingunum við endurbyggingini var akustikkurin, at fáa ein góðan ljóðburð í einum stórum rúmi, har skráveggir og parablar skulu samvirka. Við góðari sakkønari akustiskari ráðgeving úr Danmark, Japan og Frankaríki hevur eydnast at skapa eitt tónleikarahús á høgum akustiskum støði. Hetta er ein fyrimunur, ikki bara til konsertir, men eisini í gerandisdegnum, har góði akustikkurin er við til at skapa intimitet og eina róliga, blíða atmosferu, tá ið fólk tosa sínámillum.

SALT sær fram til at bjóða øllum gestum, bæði útlendingum og føroyingum, til Suðuroyar at uppliva eina serstaka oyggj og eitt serstakt bygningsverk, sum hevur verið við til at menna mentanarlívið í oynni. Eitt tað besta dømið um hetta er Suðuroyar Sjónleikarafelag, sum við SALT hevur fingið ein nýggjan pall til framførslu. Suðuroyar Sjónleikarafelag var stovnað í SALT og er eftir fáum árum eitt av virknastu sjónleikarafeløgum í Føroyum. Stuttligt og hugaligt at síggja, hvussu pionerar lofta møguleikunum, tá ið mentanin spælir við.

Arkitektarnir, sum stóðu fyri endurgerðini av bygninginum, vóru Albert Isfeldt, arkitektur, Tórshavn, og C. F. Møller Architects, Århus. Byggikostnaðurin var rindaður av A.P. Møller Grunninum, Føroya Løgtingi og danska statinum. Rakstrarpeningurin verður rindaður av Føroya Landsstýri og Tvøroyrar kommunu.

*Ólavur Rasmussen*

# PostEurop 30 ár
# Hvít nykurt







**Hvít nykurt**
Listafólk: Astrid Andreasen

Í ár eru 30 ár, síðan PostEurop varð stovnað. Tískil er 30 ára búmerkið hjá PostEurop sett á vakra frímerkið hjá Astrid Andreasen. Endamálið við PostEurop er samstarv millum postverk í Evropa.

## Hvít nykurt *Nymphaea alba*

Íblásturin til grikska heitið *nymphaia* og latínska heitið *nymphaea* stavar frá álvafljóðunum í griksku og latínsku gudalæruni.

Næst okkum veksur hon bæði í Noregi, Danmark, Svøríki og Onglandi. Men annars veksur hon í meginpartinum av Evropa, í Norðurafrika og í Miðeystri.

Palli Clementsen, sum var av Sandi, flutti sum ungur til Noregs, sambært systirdóttrini Anni Sólsker. Hann hevði hvítu nykurtina við sær, tá hann í umleið 1976 kom heim at ferðast, og tá setti hann hana í Nykutjørn, sum liggur á privatari jørð í Sandoynni.

Her á landi veksur einastandandi vakra hvíta nykurtin bara í Nykutjørn. Blóman kann verða upp til 20 cm í tvørmáti, og hjartaformaðu bløðini eru upp til 30 cm í tvørmáti. Bæði blóman og bløðini flóta oman á vatninum.

Sandoyingur fortaldi mær, at tá børn spældu við Nykutjørn, var tað teimum álagt ikki at nerta við hvítu nykurtina.

Forna navnið *Nymphaia* vísir í myndamáli á eina guddómliga náttúruveru, sum man hevur ímyndað sær at vera eina unga gentu, sum býr í vøtnum ella aðrastaðni í náttúruni. Og hetta hevur Palli helst hugsað um, tá hann setti plantuna í Nykutjørn, tí tað passar sum fótur í hosu til heitið á hvítu nykurtini. Kanska hevur hann eisini hugsað um javnvágina í náttúruni við at seta eina guddómliga náttúruveru niður í vatnið til Nykin við tí heldur dapra ummælinum.

Á Sandi hava tey risan Gorus og Gívrina (Gívrunarsteinur), ið bæði halda til móti vestri, og so Nykin, sum býr í Nykutjørn, sum liggur í ein útnyrðing.

Nykurin er kendur frá søgnum í øllum Skandinavia, og sagnirnar líkjast. Sum oftast sigur man hann hava umvendar hógvar og standa hálvur upp úr vatninum fram við áarbakkan.

*"Nykurin býr í vøtnum; á botninum niðri í dýpinum hevur hann sítt tilhald; men haðan fer hann ofta á land, og honum er ikki gott at møta; stundum er hann líkur einum vøkrum lítlum hesti, sum tykist at vera góður og spakur, og harvið lokkar hann fólk at nærkast til sín at klappa honum og strúka honum eftir baki, men tá ið tey tá koma at nerta við halan, verða tey áføst við hann, og tá sleppur hann ongum, men dregur tey við sær til botns í vatninum.*

*Stundum møtir hann fólki í manslíki sum ein prúður unglingi at lokka gentur við sær og lovar teimum gleði og gaman í síni høll, um tær vilja fylgja honum eftir; men fáa tær tá illgruna um, hvør hann er, sum tær eru við at geva seg burtur til, so at tær fáa nevnt hann við rætta navni: "Nykur", missir hann maktina yvir tær og má sleppa teimum og fara einsumallur í vatn sítt.*

*Tað er sagt, at nykurin kann líkaleiðis umskapa seg líkan øllum ferføttum djórum, uttan stikulin av veðra- ella veðurlambshorni skal hann ikki kunna skapa á seg; men rossi er hann líkur, tá ið hann ikki hevur broytt ham sín, og tað hevur borið monnum til at fáa vald yvir hann við at rista kross á bakið á honum, og hava teir tá havt hann til at draga við halanum stórt grót oman úr fjøllum til gerðisgarðar ella hús, sum enn sæst í Húsavík í Sandoy og á Eiði í Eysturoy, og tað stóra grótið, ið har er saman komið, ber vitni um, hvussu sterkur hann er. Á Takmýrum í Sandoy liggur ein stórur klettur, sum teir vildu hava hann at draga til Húsavíkar; men har slitnaði halin, og steinurin stendur har; ein partur av nykarhalanum, sum var áfastur við steinin, er sjónligur á honum enn".*

*V.U. Hammershaimb: "Færøsk Anthologi I", 1891. Kelda: Snar.*

*Heimildarfólk: Anni Sólsker, Hanna og Julianna Joensen.*

*Marita Gulklett*



**Hvít nykurt í Nykutjørn**
Mynd: Marita Gulklett

# Vard verkstøð og verkhús

# Einglar










**Einglar**
Myndir: Fotostudio
Einglar: Fragdin og Virkni

Einglar boða frá, at jólini eru í nánd; vit seta ferðina niður og fara undir at gera klárt til jóla.

Virknistænastur ætlaðar fólkum millum 18 og 67 ár kunnu skipast sum vard verkstøð og verkhús. Hetta eru tænastur til tey, ið bera likamligt ella sálarligt brek ella hava víðfevndar sosialar trupulleikar, og er mennandi sosialnámsfrøðiligt virksemi.

Fyrsta varda verkstaðið varð sett á stovn í 1973 í Havn. Í dag eru fimm vard verkstøð og virknistilboð undir Almannaverkinum runt um í Føroyum. Umleið 190 fólk við serligum avbjóðingum hava sína dagligu gongd á vardum verkstaði og verkhúsum.

Tilboðið er ætlað fólkum, sum hava tørv á stuðli og hjálp í gerandisdegnum. Dentur verður lagdur á at stimbra og menna samskiftisevni, sansir og kropp.

Arbeiðið er skipað á ein hátt, sum gevur fólkunum møguleika at menna sína persónsmensku, sínar sosialu og likamligu førleikar.

Øll vilja gera mun í sínum dagligu gerningum, tí hevur tað stóran týdning, at fólk, ið bera likamligt og sálarligt brek, hava arbeiði at fara til. At evna til lutir, sum onnur eisini hava gleði av, gevur hesum enn størri týdning.

## Jólasølurnar

Virksemið á vardu verkhúsunum og verkstøðunum er ymiskt frá staði til stað, men eitt, sum øll hava til felags, er tann árliga jólasølan, tá verkstøð kring landið hava møguleika at selja nógvu ymisku lutirnar, sum borgarar hava framleitt ígjøgnum árið. Jólasølurnar hava verið skipaðar á ymiskan hátt, men seinastu nógvu árini hava tær verið í hølunum hjá hvørjum verkstaði sær.

Umframt týdningin, sum sølan hevur fyri raksturin, hevur jólasølan eisini stóran týdning fyri tey, sum arbeiða á verkhú-

sum og verkstøðum dagliga. Tey hava ymiskar uppgávur og luttaka eftir førimuni í sjálvari søluni, har tey uppliva, at fólk – bæði kend og ókend, – koma á gátt at keypa lutir, sum tey hava evnað. Hetta stuðlar undir arbeiðinum og er við til at menna og økja um teirra sjálvsvirði og sjálvsálit.

Jólasølurnar eru eisini eitt høvi at bjóða almenninginum innum og varpa ljós á okkara arbeiði innan serøkið í Almannaverkinum. Her kunnu vit vísa, hvussu okkara fólk evna lutir og hvørjum námsfrøðiligum arbeiðsháttum, vit arbeiða útfrá og við. Til jólasøluna fáa øll vit, sum hava okkara dagligu gongd  á verkstaðnum, møguleikan at vísa og siga frá okkara arbeiði. Vit síggja, at nógvir kundar koma aftur á hvørjum ári, men eisini at nýggir kundar leggjast afturat. Fólk verða ofta bergtikin av at síggja, hvussu nógv okkara fólk megna og tað virðið, sum liggur í øllum handgjørdu lutunum, sum verða evnaðir her.

## Einglar

Umframt at gera nissur og ymiskt, sum hóskar seg til jólini, hava einglar altíð verið ein partur av jólasøluni. Einglarnir boða frá, at jólini eru í nánd; vit seta ferðina niður og fara undir at gera klárt til jóla.

Einglarnir, sum verða framleiddir, eru allir handgjørdir og serstakir. Vit leggja okkum eftir, at tilgongdin í framleiðsluni av lutunum er týðandi, mennandi og við til at førleikamenna tey skapanarligu evnini. Tað liggur eitt stórt arbeiði aftan fyri hvønn eingil. Eingin einstakur borgari framleiðir allan eingilin sjálvur, men ger sín part. Ein framleiðir kroppin, ein annar veingirnar, ein triði gloriuna og so framvegis. Eingilin er sostatt ein ímynd av, hvussu menniskju við ymiskum førleikum kunnu arbeiða saman og mennast í felag. Ongin megnar alt, øll megna okkurt – saman megna vit nógv.

*Súsanna Clementsen, Verkhúsið Virkni*



**Tey gera einglar úr tógvi í Fragdini.** Mynd: Fotostudio

23. oktober 2023

# Árbók & ársmappa

Árbók og ársmappa verða send tykkum seinast í oktober saman við frímerkjaútgávuni, sum er tann 23. oktober.

## Árbókin 2023

Árbókin savnar allar ársins frímerkjaútgávur, og saman við frímerkjunum fært tú áhugaverdu søguna aftan fyri hvørja útgávu lýsta við greinum og vøkrum myndum.

Tekstirnir í hesi snøggu bók eru á donskum, týskum og ensku,m og hóskar bókin seg tí sera væl sum gáva til vinir og kenningar uttanlands.

Ársins frímerki mynda m.a. frímerki nr. 1000, Sornfelli, list eftir Vegghamar og hvítu nykurtina.

Eins og seinastu árini er eitt ókeypis eintak av einum svartprenti í árbókini. Svartprentið varð givið út í sambandi við, at frímerki nr. 1000 kom út í august.  Virðið á svartprentinum er 150,- kr.

***Eitt tilvildarligt eintak av kryptofrímerkjunum er eisini við í árbókini.***

## Ársmappan 2023

Kundi tú hugsað tær at keypt øll ársins frímerki skjótt og ómakaleyst?

So er hetta rætta loysnin. Í ársmappuni eru øll frímerki og smáørk, ið eru givin út í ár. Mappan verður seld fyri áljóðandi virði.

## Jólamerkini 2023

Myndevnið til ársins jólamerki var tíverri ikki klárt, áðrenn blaðið fór til prent. Haldið okkum til góðar.

Avlopið av søluni av jólamerkjaarkinum fer til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.

15 jólamerki eru í arkinum, sum kostar 30,- kr.




## Árbók 2023

+ 1 kryptofrímerki
+ 1 ókeypis svartprent
Prísur: 695,- kr




## Ársmappa 2023

Pris: 657,- kr



## Heftimappa 2023

Í mappuni ery tey trý sjálvklistrandi frímerkjaheftini, sum eru givin út í ár.

Myndevnini eru Skálhøvdi, Europa 2023 og einglar.

Prísur: 498,- kr



## FDC mappa 2023

Allir fyrstadagsbjálvar við røð og fyrstadagsbjálvar við smáarki, sum eru givnir út í ár, eru við í mappuni – í alt 13 bjálvar.

Prísur: 722,- kr








| | | | |
|---|---|---|---|
| **Nýggj útgáva:** | **SALT** | **Hvít nykurt** | **Einglar** |
| **Útgávudagur:** | 23.10.2023 | 23.10.2023 | 23.10.2023 |
| **Virði:** | 21,00 og 61,00 kr | 21,00 kr | 21,00 og 31,00 kr |
| **Nummar:** | FO 1004-1005 | FO 1006 | FO 1007-1008 |
| **Støðd, frímerki:** | 40,0 x 30,0 mm | 40 x 30 mm | 30 x 40 mm |
| **Støðd, smáark:** | 90,0 x 50,0 mm | | |
| **Myndir / listafólk:** | Fotostudio | Astrid Andreasen | Fotostudio |
| **Prentháttur:** | Offset | Offset | Offset |
| **Prentsmiðja:** | Bpost, Belgia | Bpost, Belgia | Bpost, Belgia |
| **Postgjaldsbólkur:** | Innanoyggja bræv og brævpakki, 0-250 g. | Innanoyggja bræv, 0-100 g. | Bræv – innanoyggja og til útheimin, 0-100 g. |
| **Aðrar vørur:** | | | Sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum<br>2 postkort |

Frímerkini eru bert royndarprent og ikki altíð endalig.







| | | | |
|---|---|---|---|
| **Útgáva:** | **Ársmappa 2023** | **Árbók 2023** | **Jólamerki 2023** |
| **Útgávudagur:** | 23.10.2023 | 23.10.2023 | 23.10.2023 |
| **Prísur:** | 657,00 kr. | 695,00 kr. | 30,00 kr. |
| **Nummar:** | FO 992-1008 | FO 992-1008 | |
| **Støðd:** | 235 x 202 mm | 240 x 220 mm | 30 x 35 mm / 165 x 130 mm |
| **Prentsmiðja:** | Trykteam, Danmark | | |
| | | + ókeypis svartprent<br>+ 1 x kryptofrímerki | |

**Vørurnar kunnu bíleggjast á www.stamps.fo uml. eina viku áðrenn útgávudagin**

**Layout:** Posta Stamps
**Perma:** Varði, Nes
**Mynd:** Posta Stamps/DJ
**Prent:** Føroyaprent
ISSN 1603-0036

Posta Stamps
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

**Tlf.** 346200
stamps@posta.fo
**www.stamps.fo**

@FaroeIslandsStamps
@faroeislandsstamps
@FaroeseStamps

# Nýggjar mappur



### Frímerki nr. 1000
Smáark, svartprent og fyrsta-dagsbjálvi.
**Prísur: 370 kr.**



### Mörck nr. 1000
Smáark og svartprent.
**Prísur: 225 kr.**



### Huginn rannsóknarferðin
Felagsmappa. Smáark, Føroyar og smáark, Grønland
**Prísur: 120 kr.**

## Vel ársins frímerki 2023 á stamps.fo

Hesa ferð fer atkvøðan fram á heimasíðuni www.stamps.fo. Tað ber eisini til at senda okkum ein teldupost á stamps@posta.fo. Her eru nøkur av frímerkjunum í 2023:



FO 994



FO 995



FO 1006



FO 993



FO 996



FO 997



FO 998

**Posta Stamps luttekur á hesum framsýningum:**
Internationale Briefmarken-Börse
26.-28. oktober, Ulm, Týskland

Frimærke, Brev & Postkort messe 2023
11.-12. november, Keypmannahavn, Danmark

Posta
FAROE ISLANDS

# Bíleggingarlepi – Posta Stamps nr. 55



| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útgáva 23.06.2023 – Árstíðirnar – kryptofrímerki** | | | | | | |
| NFT230623 | Kryptofrímerki - Árstíðirnar - sett við 4 | * | 400,00 | 56,00 | | |
| NFT000001 | Kryptofrímerki - Várlot | * | 100,00 | 14,00 | | |
| NFT000002 | Kryptofrímerki - Summarlýkka | * | 100,00 | 14,00 | | |
| NFT000003 | Kryptofrímerki - Heystarleyv | * | 100,00 | 14,00 | | |
| NFT000004 | Kryptofrímerki - Vetrardropar | * | 100,00 | 14,00 | | |
| **Útgáva 10.08.2023 – Frímerki nr. 1000: Varði – FO 1000 (smáark við 1 frímerki)** | | | | | | |
| PPS010823 | Frímerki nr. 1000, smáark óstemplað | * | 100,00 | 14,00 | | |
| FFT010823 | Frímerki nr. 1000, smáark fdgst. | ⊙ | 100,00 | 14,00 | | |
| DDT010823 | Frímerki nr. 1000, smáark dgst. | ⊙ | 100,00 | 14,00 | | |
| FFU010823 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ⊙ | 105,00 | 1470 | | |
| WBPFO1000 | Frímerki nr. 1000, svartprent | ⊙ | 150,00 | 21,00 | | |
| WFRIM1000 | Mappa v/arki, svartprent og bjálva | ⊙ | 370,00 | 51,80 | | |
| **Útgáva 11.08.2023 – Martin Mörck nr. 1000 – FO 1001 (smáark við 1 frímerki)** | | | | | | |
| PPS020823 | Mörck nr. 1000, smáark óstemplað | * | 50,00 | 7,00 | | |
| FFT020823 | Mörck nr. 1000, smáark fdgst. | ⊙ | 50,00 | 7,00 | | |
| DDT020823 | Mörck nr. 1000, smáark dgst. | ⊙ | 50,00 | 7,00 | | |
| FFU020823 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ⊙ | 55,00 | 7,70 | | |
| WMORC1000 | Mappa v/ smáarki og svartprenti | * | 225,00 | 31,50 | | |
| **Útgáva 11.08.2023 – Huginn rannsóknarferðin – FO 1003 (smáark við 1 frímerki)** | | | | | | |
| PPS030823 | Huginn, smáark óstemplað | * | 31,00 | 4,35 | | |
| FFT030823 | Huginn, smáark fdgst. | ⊙ | 31,00 | 4,35 | | |
| DDT030823 | Huginn, smáark dgst. | ⊙ | 31,00 | 4,35 | | |
| FFU030823 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ⊙ | 36,00 | 5,00 | | |
| WHUGINN23 | Felagsmappa - FO + GL | * | 120,00 | 16,80 | | |
| **Útgáva 23.10.2023 – SALT – FO 1004-1005 (smáark við 2 frímerkjum)** | | | | | | |
| PPS001023 | SALT, smáark óstemplað | * | 82,00 | 11,50 | | |
| FFT001023 | SALT, smáark fdgst. | ⊙ | 82,00 | 11,50 | | |
| DDT001023 | SALT, smáark dgst. | ⊙ | 82,00 | 11,50 | | |
| FFU001023 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ⊙ | 87,00 | 12,20 | | |
| **Útgáva 23.10.2023 – Hvít nykurt – FO 1006 (1 frímerki)** | | | | | | |
| PPA001006 | Nykurt, røð óst. | * | 21,00 | 2,95 | | |
| FFG001006 | Nykurt, røð fdst. | ⊙ | 21,00 | 2,95 | | |

* = óstemplað, ⊙= stemplað

# Send okkum ella bílegg á www.stamps.fo

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útgáva 23.10.2023 – Hvít nykurt – FO 1006 (1 frímerki) - *framhald*** | | | | | | |
| DDG001006 | Nykurt, røð dst. | ⊙ | 21,00 | 2,95 | | |
| FFK001006 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ⊙ | 26,00 | 3,65 | | |
| FFM001006 | Fyrstadagsbjálvi v/fýrablokkum | ⊙ | 89,00 | 12,50 | | |
| PPB001006 | 4-bl, ovari marginal, óst | * | 84,00 | 11,75 | | |
| PPC001006 | 4-bl, niðari marginal, óst. | * | 84,00 | 11,75 | | |
| PPD001006 | Nykurt, heilark 21KR (20) | * | 420,00 | 58,80 | | |
| **Útgáva 23.10.2023 – Einglar - FO 1007-1008 (2 frímerki + hefti við 6 frímerkjum)** | | | | | | |
| PPA001023 | Einglar, røð óstemplað | * | 52,00 | 7,30 | | |
| FFG001023 | Einglar, røð fyrstadagsstemplað | ⊙ | 52,00 | 7,30 | | |
| DDG001023 | Einglar, røð dagstemplað | ⊙ | 52,00 | 7,30 | | |
| PPN001023 | Frímerkjahefti, óstemplað | * | 156,00 | 21,85 | | |
| FFO001023 | Frímerkjahefti, fyrstadagstemplað | ⊙ | 156,00 | 21,85 | | |
| DDO001023 | Frímerkjahefti, dagstemplað | ⊙ | 156,00 | 21,85 | | |
| PPJ001023 | Postkort (2) | * | 14,00 | 1,95 | | |
| FFJ001023 | Maksimumkort (2) | ⊙ | 66,00 | 9,25 | | |
| FFK001023 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ⊙ | 57,00 | 8,00 | | |
| FFL001023 | Fyrstadagsbjálvi v/einkultmerkjum | ⊙ | 59,00 | 8,25 | | |
| FFM001023 | Fyrstadagsbjálvi v/fýrablokkum | ⊙ | 215,00 | 30,10 | | |
| FFP001023 | Fyrstadagsbjálvi v/hefti | ⊙ | 161,00 | 22,55 | | |
| PPB001023 | 4-bl, ovari marginal, óst | * | 208,00 | 29,15 | | |
| PPC001023 | 4-bl, niðari marginal, óst. | * | 208,00 | 29,15 | | |
| PPD001007 | Einglar, heilark 21KR (20) | * | 420,00 | 58,80 | | |
| PPD001008 | Einglar, heilark 31KR (20) | * | 620,00 | 86,80 | | |
| **Útgáva 23.10.2023 – Jólavørur** | | | | | | |
| WPPE02023 | Árbók 2023 | * | 695,00 | 97,30 | | |
| PPY002023 | Ársmappa 2023 | * | 657,00 | 92,00 | | |
| PPX002023 | Jólamerki 2023 | * | 30,00 | 4,20 | | |
| WJOJ02023 | Jólakort 2023 (3 v/bjálvum) | * | 30,00 | 4,20 | | |
| **Ymiskt** | | | | | | |
| WSEP02023 | Sepac-mappa | * | 125,00 | 17,50 | | |
| WFDM02023 | FDC-mappa 2023 | ⊙ | 722,00 | 101,00 | | |
| WHEM02023 | Heftimappa 2023 | * | 498,00 | 69,70 | | |
| LUS002023 | Síður til album 2023 | * | 130,00 | 18,20 | | |

Vinaliga fyllið út teigarnar aftanfyri ›

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ymiskt – *framhald*** | | | | | | |
| JOS002023 | Síða til jólamerki 2023 | | 30,00 | 4,20 | | |
| WGASS2023 | Framsýningarstempul, GASS 2023 | | 33,00 | 4,60 | | |
| | | | | | | |
| | **Avgreiðslugjald:** | | **30,00** | **4,20** | **1** | **30,00** |
| | | | | **Prísur í alt:** | | |

### Handfaring av kortupplýsningum

Vit kunnu ikki longur goyma tínar kortupplýsingar. Tó ert tú altíð vælkomin til at ringja til okkara á tlf. 346200 við tínum kortupplýsingum, so kunnu vit trekkja kortið beinleiðis.

### Prísbroytingar í avgreiðslugjaldi

Frá og við 1. februar 2023 eru hesi avgreiðslugjøld galdandi:

**Haldarasendingar:** 25,00 DKK
**Íleggingar:** 30,00 DKK

### Gjaldshættir

Upphæddin kann flytast á konto nr. 9870 4271212 hjá Posta Stamps.

*Vøran verður send, tá flytingin er komin á konto hjá okkum.*

*Vinarliga upplýs kundanummar, tá bílagt og goldið verður.*

Allar vørur kunnu lættliga bíleggjast á heimasíðu okkara www.stamps.fo. Goldið verður við gjaldskorti, og vøran verður send við postinum.

Navn:

Bústaður:

Postnr./Býur:

Land:

Teldupostur:

Kundanr.:

☐ Ja, takk. Eg vil fegin fáa tíðindaskriv við telduposti.

**Posta Stamps**
**Óðinshædd 2**
**100 Tórshavn**

**Tlf. 346200**

**stamps@posta.fo**
**www.stamps.fo**

PS2023